# HOFF STOFF

**Seinasta vitjanin hjá krúnprinsahjúninum seinnapartin mánadagin var hjá Færøerne Kommando í Mjørkadali, og tá var krúnprinsurin veruliga millum sínar egnu.**




*Síðsta vitjanin hjá krúnprinsahjúninum seinnapartin mánadagin var í Mjørkadali, har tey vitjaðu Færøernes Kommando og vóru ein túr uppi á Sornfelli.*
Mynd: Jens Kr. Vang

# Frederik millum sínar egnu

HOFF STUFF
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Mjørkadalur livdi eisini veruliga upp til sítt navn, tá ið kongaliga fylgi kom niðan. Mjørkin lá tjúkkur at kalla allastaðnis við gamla oyggjarvegin, og sýni mundi neyvan verða nógv meiri enn einar 100 metrar.

### Fóru niðan á Sornfelli

Tá ið tey bæði, Frederik og Mary, vóru komu niðan í Mjørkadal, heilsaðu tey upp á ovastarnar hjá Færøernes Kommando í Føroyum, og síðani hildu tey leiðina beint í ein jeep, sum skuldi koyra tey niðan til kontrolstøðina uppi á Sornfelli.

Í Mjørkadali vóru umstøðurnar hjá teimum kongaligu eitt sindur øðrvísi enn á hinum støðunum, ið tey vitjaðu, tí her vóru tað bert fólk frá Færøernes Kommando og so fjølmiðlafólk til staðar. Eingi børn ella vaksin við fløggum, sum fegin vildu sleppa at síggja krúnprinsahjúnini.

Tað sást eisini væl á krúnprinsinum, sum jú er hernaðarmaður burturav, at koma millum hermenn, og tað var einki at taka seg aftur í, at her var Fredrik millum sínar egnu.

# Føroyski myndamaðurin hjá TV2

**Danska sjónvarpsstøðin TV2 hevur ikki færri enn sjey fólk í Føroyum í sambandi við kongaligu vitjanina. Ein teirra er havnarmaðurin, Jan Fagranes, sum um tíggju dagar verður útlærdur sum myndamaður**

HOFF STOFF
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Jan Fagranes greiður frá, at hann hevur verið í læru hjá TV2 í fýra og eitt hálvt ár, og at vitjanin í Føroyum er eitt slag av sveinastykki hjá honum.

### Meiri spennandi uppgávur í Danmark

Spurdur hvørjar uppgávur, ið hann hevur dagliga í Danmark, sigur Jan Fagranes:

- Eg geri fyri tað mesta tíðindi og ítrott, men av og á eri eg eisini við til at gera Station 2, sum er eitt kriminalprogram, sigur føroyski myndamaðurin.

Jan sigur, at tað er sera stórur munur á at koma til Føroya í arbeiðsørindum, í mun til tá ið hann vitjar í frítíðini.

- Nú er alt í fokus allatíðina, og tú hevur als ikki tíð at taka tær av løttum. Í veruleikanum vil eg siga, at tað er rættuliga stuttligt soleiðis at vísa oyggjarnar fram fyri starvsfeløgunum, sigur Jan Fagranes.

Jan var búsitandi í Århus, tá ið hann í januar 2001 fekk lærupláss hjá TV2. Leiðin gekk so til Odense, har danska sjónvarpsstøðin hevur sína høvuðsstøð, men fyri hálvum ári síðani flutti Jan til Keypmannahavnar at búgva.



*Ungi havnarmaðurin Jan Fagranes, sum í hesum døgum er við TV2 í Føroyum, verður útlærdur myndamaður í komandi viku. Kongaliga vitjanin í Føroyum er eitt slag av sveinaroynd hjá honum.*
Mynd: Jens Kr. Vang

Sum áðurnevnt verður Jan liðugur at læra um tíggju dagar, men hann hevur fyribils fingið starvssáttmála við TV2 í tríggjar mánaðar afturat. Hvat síðani hendir, veit hann ikki, men hann kundi gott hugsað sær at hildi fram.

Men kundi Jan Fagranes ikki gott hugsað sær at flutt heim aftur til Føroya og møguliga fingið eitt starv í Kringvarpi Føroya?

- Ja, eg leingist illa heim aftur, men arbeiðið er nógv meiri spennandi í Danmark enn í Føroyum, sigur ungi havnarmaðurin.

Spurdur hvussu vanligi arbeiðsdagurin hjá sær í Danmark sær út, sigur Jan Fagranes:

- Tað er ilt at siga. Eg kann til dømis gott verða á Christiansborg og gera eitt innslag við Anders Fogh Rasmussen á miðdegi, og einar tveir tímar seinni eri eg í Istedgade og taki myndir av einum misnýtara, sigur Jan Fagranes at enda.